# Samkomublaðið fyri juni/juli

# 2016



KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar







www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## Men trúgvin ber...

Hans Jacob Poulsen

"Í stundini skar barnsins faðir í róp og segði: «Eg trúgvi; hjálp tú vantrúgv míni!» Markus 9;24.

Tað er so mangan, at vit koma út fyri truplum umstøðum í lívinum - vit kunnu kenna okkum bæði veik og lítisverd, og okkara gerandisdagur gongur als ikki, sum vit vildu ynskt. Avbjóðingarnar sýnast ongan enda at taka, og vit kenna okkum bæði máttleys og ráðaleys: Hvussu skulu vit megna tær avbjóðingarnar, sum okkum eru fyri?

Slíkar dagar er tað gott at fáa ugga og troyst út frá Orðinum, tí tað er livandi og máttmikið og hvassari enn nakað tvíeggjað svørð. Mangur minnist aftur hesi troystarríku orðini: "Sum dagar tínir skal tín styrki vera." (5. Mós. 33:25); "Harrin er mín styrki og lovsongur" (2. Mós. 15:2) og "Eg eygu míni hevji til fjallanna upp, hvaðani kemur mín hjálp?" (Sálm. 121:1).

Í tekstinum hjá Markusi er tað ein faðir, sum kemur til Jesus við syni sínum, sum hevur ein málleysan anda. Og faðirin sigur við Jesus: "Men um tú ert nakað mentur, tá miskunna okkum og hjálp okkum." Men Jesus segði við hann: "Um tú ert mentur! Alt er møguligt fyri honum, sum trýr." Tá er tað, at faðirin sigur hesi vælkendu orðini: "Eg trúgvi; hjálp tú vantrúgv míni."

Trúgvin er tað berandi undir kristinlívi okkara – trúgvin, sum er "sannføring um teir lutir, sum ikki eru at síggja." (Hebr. 11:1) Henda trúgvin á fullgjørda verk Jesusar á krossinum ber í hesum lívi og yvir um deyðans grøv.

Hevur tú slíka trúgv ella tørvar tær hjálp til tína vantrúgv? Í Rómverjabrævinum 10:10 stendur: "Tí at við hjartanum verður trúð til rættvísi, men við munninum verður játtað til frelsu."

Bið Harran um trúgv, tí hon ber!

BØNIN:
Harri gev mær trúgv, lat meg tæna tær,
tak í hjartað búgv, kom og ver hjá mær.
Tú mítt lív skalt fá hvønn ein lívsins dag,
tínum vegi á sálin gert so glað.

# Skrá fyri juni/juli

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 6. juni | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 7. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 8. juni | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 11. juni | kl. 20.00: | AWAKE |
| Sunnudagur | 12. juni | kl. 11.00: | Morgunmøti við Helga og Oddbjørg Abrahamsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 13. juni | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 14. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 15. juni | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 16. juni | kl.10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 18. juni | kl. 20.00: | Annarleiðis AWAKE |
| Sunnudagur | 19. juni | kl. 11.00: | Morgunmøti við Óla á Grømma, leiðara fyri New Tribes Mission (sí meira undir Lýsingar) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 20. juni | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 21. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 22. juni | kl. 20.00: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 25. juni | kl. 20.00: | AWAKE við Jóhan Petur Johannesen |
| Sunnudagur | 26. juni | kl. 11.00: | Morgunmøti. Pauli Høj skipar fyri. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 27. juni | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 28. juni | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 29. juni | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 2. juli | kl. 20.00: | LAKS við Lissi Hansen |
| Sunnudagur | 3. juli | kl. 11.00: | Morgunmøti. Rannvá Royðutoft skipar fyri. Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 4. juli | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 5. juli | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 6. juli | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 7. Juli | kl. 20.00: | LAKS í Soli Deo Gloria |
| Sunnudagur | 10. juli | kl. 11.00: | Morgunmøti. Kaj Otto Frederiksberg skipar fyri. |

# Lýsingar

Til summarskránna hava vit fingið ymiskar persónar at skipa fyri møtunum. Hesi koma møguliga sjálv at tala, men tað kann eisini verða ymiskt spontant, sum kemur inn.

**"LAKS" ungdómsmøtir í summar**
Eins og undanfarna ár fara vit aftur í summar at hava felags ungdómsmøtir saman við Lívsins Orð og Soli Deo Gloria. Vit skiftast um at hava LAKS-møtir, soleiðis, at tá vit hava ungdómsmøti, so hava tey onki, men koma til okkara, og tá hini hava ungdómsmøti, hava vit onki AWAKE, men fara til teirra møtir. LAKS møtini eru frá 2. juli til og 13. august, tá eitt stórt felags tiltak verður í Løkshøll. Meiri kunning verður á Facebook og keldan.fo.

**Óli á Grømma vitjar**
Sunnumorgunin 19 juni, talar Óli á Grømma í Kelduni. Óli og konan Judy, eru leiðarar fyri New Tribes Mission, m er ein felagsskapur við umleið 4000 trúðboðarum, hvørs endamál er at náa út við evangeliinum til ónáddar stammur og fólkasløg.
Óli, sum er klaksvíkingur, byrjaði í fulltíðartænastu fyri Harran í 1963 og hevur sostatt verið í tænastu í umleið 53 ár.

**Kaféterian**
Kaféterian er opin hvørt mikukvøld kl. 17.00-20.00.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584